# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Bjarni Jørgensen til FC Fyn

Sáttmálin er galdandi fram til august, so Bjarni Jørgensen hevur eitt hálvt ár at sannføra tey í FC Fyn um, at hann er verdur at halda uppá. Sjálvur sigur Bjarni seg vera spentan upp á uppgávuna. – Fyrstu tíðina komi eg at spæla á næstbesta liðnum, men eg fari sjálvsagt at royna at spæla meg á besta liðið, sigur Bjarni Jørgensen. Higartil hevur hann spælt ein venjingardyst, har teir vunnu heili 6-0 og Bjarni legði upp til tvey av málunum. Síðani hevur hann verið sjúkur, og tískil hevur tað ikki verið nógv av venjing ella dystum hjá Bjarna seinastu tíðina. Bjarni Jørgensen hevur vant við FC Fyn síðani tíðliga í januar. Tað var Erik Klint, sum tryggjaði honum møguleikan at royndarvenja við felagnum, og tað er eisini hann, sum hevur hjálpt Bjarna Jørgensen við at fáa sáttmálan í lag. Bjarni er ikki fyrsti føroyingurin í FC Fyn. U21-landsliðsleikarin Viljormur Davidsen, sum eisini hevur verið inni kring A-landsliðið, er fastur maður í verjuni á besta liðnum hjá FC Fyn. Hann hevur eisini verið tikið lut í teimum flestu venjingardystunum hjá FC Fyn í ár.

# Sam Vang skjótastur

**FRÆLSUR ÍTRÓTTUR** Leygardagin var fyrsta FM-kappingin í cross-renning í høvuðsstaðnum, tá 23 rennarar fyrrapartin løgdu til brots á einum rættiliga fjølbroyttum teini í við studentaskúlan í Hoydølum

Hilmar Jan Hansen

Frælsur Ítróttur Føroya, sum skipar fyri FM-renningini, hevði hesa ferð valt at skift vanliga teinin til crossrenningina, sum undanfarin ár hevur verið á Svangaskarði, út við nýggja teinin í Hoydølum í teirri vón, at kanska fleiri rennarar fara at halda seg framat. Málið var 30 rennarar, men hóast tað gjørdist met hesa ferð, vóru rennararnir »bara« 23 í tali.

Lagt var til brots klokkan 11 fyrrapartin leygardagin í betri líkindum, enn morgunin annars hevði lagt upp til, tí tað var slitið í og helt sær turt, meðan kappingin var. Teinurin var soleiðis til longdar, at tey vaksnu runnu hann seks ferðir, unglingarnir tríggjar ferðir og børnini tvær ferðir.

Hjá monnunum, sum runnu um átta kilometrar, gjørdist tað nokk so leingi ein kapping millum Sam Vang og Guttorm Sørensen, men her royndist Sam drúgvari og kom á mál eini 10 sekund fyrri, og nakað aftan fyri teir báðar kom so Jonhard Larsen á mál sum nummar tvey. Vinnaratíðin hjá Sam var 32 minuttir og 56 sekund. Hjá kvinnunum var bara Rebekka Fuglø við, og hon brúkti 40 minuttir og 37 sekund um teir átta kilometrarnar.

### Góðar umstøður

Veteranar og superveteranar vóru eisini við í opna bólkinum hjá monnum, men kappaðust samstundis sínamillum. Hjá veteranunum var John Egholm fremstur, umframt at hann í samlaðu kappingini kom fjórður á mál, og honum á baki komu Kári Simonsen og Bent Jakobsen. Heðin Johannesen vann bólkin hjá superveteranunum framman fyri Gunnar Simonsen.

Marnar Djurhuus gjørdist tann drúgvasti av mansunglingunum á umleið fýra kilometra langa teininum, og hann kom á mál við tíðini 15 minuttir og 14 sekund, og var hann næstan tveir minuttir skjótari enn nummar tvey, sum var Rúni Seloy. Hjá kvinnuunglingunum var Elsa Berg fremst við tíðini 21 minuttir og 58 sekund, og tær báðar næstu vóru Dagmar Johannesen og Anita Gregersen.

Tey yngstu runnu umleið 2,8 kilometrar, og her vann Karin Holm Simonsen hjá gentum og Rógvi Johansen hjá dreingjum.

Sum skilst, vóru rennararnir yvirhøvur á einum máli um, at hesin nýggi teinurin og umstøðurnar í Hoydølum vóru væl egnað til cross-renningina, so tí bendir alt á, at føroyameistarakappingin í hesi grein aftur verður á hesum stað komandi ár.




*Sam Vang gjørdist fyrstur á mál í crossrenningini í Hoydølum leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Góði stimin heldur fram

**TALV** – Nú trý umfør resta í FM-liðkappingini, eru teir úr Sandavágs Talvfelag trý stig fremstir. Teir vunnu í vikuskiftinum 4-0 á einum heldur viknaðum Klaksvík 2. Torkil Nielsen vann enn einaferð og hevur nú sjey stig av sjey møguligum

Uni Holm Johannesen



Havnarmenn fingu ikki fult móti Sandavági 2. Teir høvdu heldur ikki støður til meira og eiga tí at vera glaðir fyri 3,5 stig.

Klaksvíkingar hanga so dánt í toppinum. Teir vunnu á vestmenningum, men nógv bendir á, at teir helst vera ov stuttir í ár til av álvara at hótta.

Áttanda og triðseinasta umfar verður 27. februar. Tá taka klaksvíkingar ímóti toppliðnum úr Sandavági, og havnarmenn kunnu kanska hála seg nærri toppinum við góðum úrsliti móti Klaksvík 2.

Framvegis er einki avgjørt, tí havnarmenn kunnu við góðum endaspurti avgera tað sjálvir. Í 9. umfari, sum verður 6. mars, hitta teir nevniliga sandavágsmenn í sonnum toppdysti.

**7. umfar:**
Sandavágur - Klaksvík2 4-0
Havnin - Sandavágur2 3,5-0,5
Vestmanna - Klaksvík 1,5-2,5

**Støðan**

| | |
|---|---|
| Sandavágur | 23,0 |
| Havnin | 20,0 |
| Klaksvík | 16,5 |
| Vestmanna | 12,5 |
| Klaksvík2 | 7,5 |
| Sandavágur2 | 4,5 |

## Miðlarnir skriva....

Havi tað ikki gott við, at ungir spælarar sita á beinkinum heilan dyst, tá ið liðið er odda við átta málum. Tað er so týdningarmikið at fáa so nógvar spælarar sum tilber á vøllin og framvegis hava tak á støðu. Hetta er dygd, og neistamenn høvdu ráð til hetta leygardagin.

*www.neistin.fo*

Undan dystinum bleiv sagt frá báðum pørtum, at tað serliga fóru at verða verjunar sum komu at vera avgerandi, og her sýntist sum at Tjaldur hevði gjørt sítt heimaarbeiði væl.

*www.nordlysid.fo*

Dysturin var tættur og spennandi. Ikki tað fína poleraða spæli, men eitt liðavrik, sum veruliga setti Stjørnuna uppá pláss. Adina og Simona hava mangan verið okkum góðar, og í gjár var einki undantak. Tær vóru sum ein múrur í verjuni og skutu mál í næstan hvørjum álopi.

*www.tjaldur.net*

Høllin á Hálsi var full av fólki frá kl. 13.00 í dag til kl. 21.30 í kvøld. Ongin ivi er um, at finaludagurin hevur verið sera góð reklama fyri føroyskan hondbólt, og HSF eigur stórt rós fyri væl fyriskipaða

*www.kyndil.fo*